

*Soleiðis sá út uppi við Hórisgøtu í 1965. Bilar norðan fyri bíða eftir ferðafólkum, sum koma til gongu eftir brúnni um Skeiðsá. Har eru hýruvognar, bussar og lastbilar*

*Mynd: Petur Müller*

gøtu til bilarnar hinumegin. Hetta hevur ikki altíð verið so tespiligt, tá hugsað verður um at ferðafólkini skiftu millum bilarnar uppi í fjøllunum í øllum veðri.

Ruturnar úr Havn høvdu samband um Vestmannasund til Vágar og norðureftir Streymoynni við sambandi heilt norður til Gjáar. Sendarar og radioreléstøðir vóru sett upp á Sornfelli, soleiðis at rutubilarnir kundu hava telefonsamband millum sín, fyri at tað altíð vóru nokk av bilum til ferðafólkini báðumegin.

## Oyggjarvegurin samanbundin

Tað var ikki fyrr enn 6. juli 1966, at Oyggjarvegurin varð samanbundin. Dagblaðið skrivar mikudagin 13. juli 1966.

» – Seinasta mikumorgun varð Oyggjarvegurin samanbundin við brúgv um Skeiðsá.

Kjartan Mohr, formaður í løgtingsins havna- og veganevnd, bjóðaði arbeiðsmonnum og leiðarum til eina lítla samkomu. Merkið var vundið á stong og arbeiðsmenninir slerdu ring á vegnum. Ein snórur sum varð spentur var tvørtur um vegin, sum síðan varð kvettur av bilinum hjá Kjartani Mohr, formanni vega- og havnanevndini hjá løgtinginum, sum eisini helt røðu í hesum sambandi.

Kjartan segði m.a. – Oyggjarvegurin hevur verið eitt hjartamál hjá mær líka frá tí degi, at Havnar kommuna tók fyrsta stigið fyri umleið 30 árum síðani og legði vegin norður á Sundsháls.

Nú er so Streymoyggin so gott sum samanbundin og fara vit nú undir at fáa Eysturoynna bundna saman við Streymoynna. Eg vil veita øllum arbeiðarum og leiðslu løgtingsins tøkk fyri arbeiðið, ið er væl úr hondum greitt, og skal eg nú vegna Føroya Løgtings veg- og havnanevnd lýsa vegin samanbundnan.«

Eftir at Oyggjarvegurin bleiv samanbundin í 1966, blivu ferðafólkið eina tíð skift um í Kollfjaðradali.

Seinni koyrdu rutubilarnir norðanfyri heilt til Havnar, og høvdu ferðafólk við sær norðuraftur, eins og teir í Havn koyrdu til ferjurnar í Hvalvík ella Vestmanna.

Rutukoyringin eftir Oyggjarvegnum við persónbilum og smærri bussum helt á øll sekstiog sjeytiárini til rutan bleiv avloyst av Bygdaleiðum í 1980.

Í dag er verður Oyggjarvegurin mest nýttur av teimum sum búgva í Norðradali og til koyring á sambandi við arbeiðsplássini í Mjørkadali, á Sornfelli og í Hundsarabotni.



*Merkið varð vundið á stong og arbeiðsmenninir sláa ring, tá Oyggjarvegurin bleiv samanbundin 6. juli 1966*

*Mynd: Landsverkfrøðingurin*



*Rutubilarnir norðan fyri og sunnan fyri koyrdu niðan til Hórisgøtu, og ferðafólkini gingu eftir eini gøtu millum vegirnar. Fremst á myndini eru ein Rambler Cassic stationcar frá 1964 og ein VW Transporter bussur*

*Mynd: Hjalti Skaalum*